# Flogbóltssamband Føroya

## Tórshavn

(V-tal 358.940)

(V-tal 571.717)

# Ársfrásøgn

# 2023

Ársfrásøgnin framløgd og góðkend á aðalfundi felagsins tann 21. apríl 2024

fundarstjóri

## INNIHALDSYVIRLIT

Síða


Upplýsingar um felagið ........ 2

Leiðsluátekning ........ 3

Átekning frá óheftum grannskoðara ........ 4 - 5

Nýttur roknskaparháttur ........ 6 – 7

Rakstrarroknskapur ........ 8

Fíggjarstøða ........ 9

Notur ........ 10

menta
skrásettir grannskoðarar

## UPPLÝSINGAR UM FELAGIÐ

| | |
|---|---|
| **Felagið** | |
| Navn: | Flogbóltssamband Føroya |
| Bústaður: | Á Frælsinum 30 |
| Bústaður: | P.O. Boks 1021 |
| Heimstaður: | FO-100 Tórshavn |
| Telefon: | 218 766 |
| T-postur: | fbf@fbf.fo |
| Heimasíða: | www.fbf@fo |
| Stovningarár: | 1. apríl 1980 |
| Roknskaprár: | 1. januar til 31. desember |
| V-tal: (vanligar lønir) | 358.940 |
| V-tal: (ítróttarsamsýning) | 571.717 |
| **Stjórn:** | Jóhan Vest<br>stjóri |
| **Nevnd:** | Peter Holm, formaður<br>Guðrun L. Joensen, næstforkvinna/skrivari<br>Jóhan á Mýrini, nevndarlimur |
| **Grannskoðari:** | MENTA Sp/f<br>skrásett grannskoðanarvirki<br>FO-110 Tórshavn<br>t-postur: menta@menta.fo<br>www.menta.fo |

menta

LEIÐSLUÁTEKNING

Leiðslan, ið hevur ábyrgdina av ársfrásøgnini, hevur í dag viðgjørt og samtykt ársfrásøgnina fyri 2023 hjá Flogbóltssambandi Føroya.

Ársfrásøgnin er sett upp samsvarandi lógum felagsins og tillagað ásetingunum í galdandi føroyskum roknskaparleiðbeiningum. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari og niðanfyristandandi nýttum roknskaparhátti, umframt eftir kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er hóskandi soleiðis, at ársfrásøgnin gevur eina rætta mynd av ognum, skyldum, fíggjarligu støðuni og úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum.

Ársfrásøgnin verður løgd fyri aðalfundin við tilmæli um góðkenning.

Tórshavn, tann 21. apríl 2024

Jóhan Vest
stjóri

Pætur Holm
formaður

Guðrun L. Joensen
næstforkvinna/skrivari

Jóhan á Mýrini
nevndarlimur

## GRANNSKOÐANARÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

**Til Flogbóltssamband Føroya.**

### Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Flogbóltssamband Føroya fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2023 við rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu og notum, íroknað nýttum roknskaparhátti. Ársroknskapurin er gjørdur eftir niðanfyri ásettu roknskaparreglum og kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av felagsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðu tann 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi felagsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2023 samsvarandi nýttu roknskaparreglum.

### Grundarlag undir niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardir fyri grannskoðan og aðrar ásetingar í føroysku grannskoðanarlóggávuni. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er neyvari útgreinað í brotinum niðanfyri "Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin". Vit eru óheft av felagnum í samsvari við altjóða etisk krøv fyri grannskoðarar (etisku reglurnar hjá IESBA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum, og hava fylgt etisku skyldunum, sum ásettar eru í hesum standardum og krøvum. Okkara fatan er, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

### Týðandi óvissa um framhaldandi rakstur

Uttan at tað hevur ávirkað niðurstøðu okkara, skulu vit gera vart við, at raksturin vísur hall, eginpeningurin er negativur við 2,2 mió.kr. og sersambandið hevur avmarkað tøkt gjaldføri við roknskaparlok, umframt at treytir frá lánsveitara ikki eru hildnar. Framhaldandi rakstur er treytaður av at leiðslan fær vent gongdini við at tillaga rakstur og virksemi. Víst verður til notu 1 í roknskapinum, har leiðslan grundgevur fyri ta ávísu týðandi óvissu, ið knýtt er at hesum og hví ársroknskapurin er uppsettur við framhaldandi rakstri fyri eyga.

### Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við nýttu roknskaparreglum. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið nevdnin metir krevst fyri, at ársroknskapurin kann verða gjørdur uttan týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ið ársroknskapurin verður gjørdur, er tað ábyrgd leiðslunnar at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum, og, har tað hevur týdning, at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, at gera ársroknskapin eftir roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum ella, at leiðslan í roynd og veru ikki hevur annan møguleika.

### Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin

Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at gera eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissa er vissa á høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum er gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan, og ásetingunum í føroysku grannskoðanarlóggávuni, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, um teir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og mugu metast at vera týðandi, um sannlíkindi eru fyri, at tey hvør sær ella saman ávirka tær fíggjarligu støðutakanir, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini. Har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðan fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, sama um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tær grannskoðanargerðir, sum hesir váðar krevja, og fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru neyðug og egnað sum grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri at týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, ikki verða avdúkaðir, er hægri enn týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari dyljan, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa innlit í innanhýsis eftirlitið, sum hevur týdning fyri grannskoðanina fyri at leggja tær grannskoðanaratgerðir til rættis, sum eru nøktandi til umstøðurnar, men ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um tann roknskaparháttur, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingarnar og viðheftu upplýsingarnar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.

- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparásetingunum um framhaldandi rakstur, og um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa í sambandi við atgerðir og viðurskifti, sum kunnu hava við sær týðandi óvissu, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit vísa á hesi viðurskifti í ársroknskapinum í niðurstøðu okkara ella, um hesar ávísingarnar ikki eru nóg mikið, tillaga okkara niðurstøðu. Niðurstøður okkara byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar í framtíðini ella onnur viðurskiftir kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.

- Taka støðu til ta samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini, og nær grannskoðað verður, og eisini um týðandi eyleiðingar, herundir um møguligar týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

**Váttanir samsvarandi øðrum lóggávum og øðrum reglum**

**Onnur viðurskiftir um aðra lóggávu og reglur**
Uttan at tað hevur ávirkað okkara niðurstøðu, skulu vit upplýsa at felagið í stríð við mvg-lógina einans letur fullfíggjaða mvg-uppgerð inn fyri 4. ársfjórðing. Hinar ársfjórðingarnar eru uppgerðirnar innlatnar við 0 kr.

Tórshavn, tann 21. apríl 2024

**MENA Sp/f**
skrásett grannskoðanarvirki

Fríða Óladóttir Poulsen
skrás. grannskoðari

## NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

**Alment**
Ársfrásøgnin er gjørd eftir niðanfyri ásettu roknskaparreglum. Umframt eftir kunngerð nr. 125 frá 19. september 2011 um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan. Roknskaparhátturin er óbroyttur frá í fjør.

Allar upphæddir verða uppgjørdar í donskum krónum (DKK). Allar upphæddir í ársfrásøgnini verða avrundaðar til heil tøl og tí kunnu avrundingarmundir vera millum upplýstar samanteljingar og summin av teimum undirliggjandi tølum.

**Um innrokning og virðisáseting**
Inntøkur verða innroknaðar í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða vunnar eins og virðisjavningar av fíggjarligum ognum og skyldum. Í rakstrarroknskapinum verða somuleiðis allir kostnaðir, íroknað avskrivingar og niðurskrivingar, innroknaðir.

Ognir verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini fær fíggjarliga ágóðar, og virðið á ognunum kann gerast upp álítandi.

Skyldur verða innroknaðar í fíggjarstøðuna, tá ið tað er sannlíkt, at felagið í framtíðini skal av við fíggjarligar ágóðar, og virðið á skyldunum kann gerast upp álítandi.

At byrja við verða ognir og skyldur innroknaðar til kostprís. Síðani verða ognir og skyldur virðisásettar sum lýst niðanfyri fyri hvønn roknskaparpost sær.

Ávísar fíggjarligar ognir og skyldur verða virðisásettar til amorteraðan kostprís, og sostatt verður ein konstant effektiv renta innroknað yvir gildistíðina. Amortiseraður kostprísur verður uppgjørdur sum upprunaligur kostprísur við frádrátti av møguligum avdráttum og ískoyti/frádrátti av samlaðu amortiseringini av muninum millum kostprísin og áljóðandi virði.

Í sambandi við innrokning og virðisáseting verður hædd tikin fyri væntaðum tapum og vandum, sum íkoma áðrenn ársfrásøgnin verður løgd fram, og sum vátta ella avsanna viðurskifti, ið vóru til staðar fíggjarstøðudagin.

Møgulig marknaðarlig virðisminking á ognum í árinum verður mett ikki at verða varandi.

### Rakstrarroknskapurin

**Inntøkur**
Inntøkur verða tiknar við í rakstrarroknskapin so hvørt sum tær verða staðfestar. Stuðul og aðrar sáttmálainntøkur verða tiknar við tá hesar eru játtaðar og verða tíðaravmarkaðar.

**Rakstrarkostnaður**
Allur rakstrarkostnaður til høvuðsrakstur felagsins, ið hoyrir árinum til við tíðaravmarkingum, verður rakstrarførdur svarandi til rakstrarárið. Kostnaðirnir fevna um kostnað fyri innan- og uttanlands kappingar, landslið, úrval, skeið, felags- og fyristingarkostnaðir, umframt fíggjarkostnaðir.

**Starvsfólkakostnaður**
Starvsfólkakostnaður er lønir, samsýningar, frítíðarlønir, eftirlønir og almenn lønargjøld, umframt annan starvsfólkakostnað.

## Fíggjarstøða

**Materiell støðisogn**
Materiell støðisogn verður upptikin til útveganarvirði við frádrátti fyri samlaðum avskrivingum. Ella til endurvinningarvirðið, um tað er lægri. Endurvinningarvirðið er virðið á ognini við framhaldandi nýtslu ella við sølu.

Útveganarvirði eru kostnaðir, ið beinleiðis eru knýttir at íløguni fram til, tá ið ognin verður tikin í nýtslu. Útveganarvirði fyri eina samlaða íløguogn verður býtt í ognarlutir, ið verða avskrivaðir hvør sær, um brúkstíðin av hvørjum ognarluti sær er ymisk.

Avskrivingar eru grundaðar á ætlaða brúkstíð (livitíð) og ásett restvirði (scrapvirði) og verða gjørdar við eins upphæddum hvørt ár. Tilgongdir í árinum verða avskrivaðar frá keypsmánaði. Felagið hevur ásett hesar brúkstíðir og restvirði:

| | Brúkstíð | Restvirði |
|---|---|---|
| Gólv | 10 ár | 0% |

Vinningur ella tap við sølu av materiellari støðisogn verður gjørt upp sum munurin millum sølupris, frádrigið sølukostnað og roknskaparliga virði søludagin og rakstrarført undir avskrivingar.

**Áogn**
Áogn verður virðisásett til amorteriseðan kostprís, sum vanliga svarar til áljóðandi virði, við frádrátti av væntaðum tapum.

**Tíðaravmarkingar**
Tíðaravmarking verða gjørd fyri allar týðandi inntøkur og kostnaðir.

**Peningur**
Peningur er tøkur kassa- og innlánspeningur.

**Fremmand skuld**
Langfreistað skuld verður tikin við til kostprís við lántøku, svarandi til útgoldnu peningaupphæddina við frádrátti fyri handilskostnað. Eftir tað verður skuldin tikin við til niðurgoldna virðið, svarandi til restskuldina við roknskaparlok.

Øll stuttfreistað skuld er tikin við til niðurgoldið (amortiserað) útveganarvirði, ið vanliga er áljóðandi virði roknskapardagin. Eingin skuld er í fremmandum gjaldoyra

## RAKSTRARROKNSKAPUR

| | Notur | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| **Inntøkur:** | | | |
| Stuðul til úrvalsítrótt | 2 | 40.000 | 50.000 |
| Aðrar inntøkur | 3 | 3.473.277 | 3.589.293 |
| **Inntøkur tilsamans** | | **3.513.277** | **3.639.293** |
| **Kostnaðir:** | | | |
| Rakstrarkostnaðir | 4 | -2.476.272 | -4.697.810 |
| Felagskostnaðir | 5 | -147.551 | -265.935 |
| Fyrisitingarkostnaðir | 6 | -138.175 | -241.845 |
| Starvsfólkakostnaðir | 7 | -1.618.306 | -785.233 |
| Avskrivingar | 8 | -24.482 | 0 |
| **Kostnaðir tilsamans** | | **-4.404.787** | **-5.990.823** |
| **ÁRSÚRSLIT** | | **-891.510** | **-2.351.531** |

# FÍGGJARSTØÐAN TANN 31. DESEMBER

| OGN | Notur | 2023 | 2022 |
|---|---|---|---|
| Kappingargólv | | 220.342 | 0 |
| **Støðisogn tilsamans** | | **220.342** | **0** |
| Skuldarar | | 36.950 | 222.488 |
| Tíðaravmarking | | 72.276 | 0 |
| Meirvirðisgjald | | 15.994 | 0 |
| **Áogn tilsamans** | | **125.219** | **222.488** |
| Innlánspeningur | | 134.115 | 104.497 |
| **Tøkur peningur tilsamans** | | **134.115** | **104.497** |
| **OGN SAMANTALT** | | **479.677** | **326.985** |

| **SKYLDUR** | | | |
|---|---|---|---|
| Eginpeningur við ársbyrjan | | -1.343.591 | 1.007.939 |
| Ársúrslit | | -891.510 | -2.351.531 |
| **Eginpeningur við ársenda** | | **-2.235.101** | **-1.343.591** |
| Lán frá ÍSF | | 1.200.000 | 1.200.000 |
| **Langfreistað skuld tilsamans** | | **1.200.000** | **1.200.000** |
| Frammanundangoldin landskassastuðul frá ÍSF | | 500.000 | 0 |
| Skyldug løn og lønargjøld | | 200.474 | 0 |
| Vøru- og tænastuskuld | | 814.305 | 470.576 |
| **Stuttfreistað skuld tilsamans** | | **1.514.778** | **470.576** |
| **EGINOGN OG SKYLDUR SAMANTALT** | | **479.677** | **326.985** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Framtíðarútlit | 1 | | |
| Veðsetingar og eventualskyldur | 9 | | |

# NOTUR

**Nota 1. Framtíðarútlit**

Sersambandið hevur hall í árinum og eginpeningur er negativur við 2,2 mió.kr. Nevndin ásannar at sersambandið hevur avmarkað tøkt gjaldføri og stóra skuld við roknskaparlok.
Nevndin hevur eitt áhaldandi samband og samstarv við ÍSF, sum er lánsveitari, um fíggjarstøðuna og gjaldføri. Umframt hetta hevur nevndin sett gongd í eitt umfatandi arbeiði við stuðlum og metur, at við einum áhaldandi munandi virkisstigi, fer komandi árið at geva avlop. Fíggjarætlanir eru gjørdar, sum vísa, at eginpeningurin verður endurvunnin komandi árini og er ársroknskapurin tí uppsettur við framhaldandi rakstri fyri eyga.

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 2. Stuðul til úrvalsítrótt** | | |
| Stuðul til úrvalsítrótt | 40.000 | 50.000 |
| | **40.000** | **50.000** |
| | | |
| **Nota 3. Aðrar inntøkur** | | |
| Landskassastuðul frá ÍSF | 1.251.781 | 1.271.820 |
| Stuðul til kappingar o.a. | 829.860 | 900.000 |
| Inntøkur kappingar | 172.360 | 809.932 |
| Flogbóltsskúlin | 37.400 | 0 |
| Stuðul til gólv | 244.825 | 0 |
| Aðrar inntøkur | 937.051 | 607.540 |
| | **3.473.277** | **3.589.293** |
| | | |
| **Nota 4. Rakstrarkostnaðir** | | |
| FM Kappingar | -355.364 | -343.880 |
| Steypakappingar | -106.058 | -148.073 |
| Manslandslið | -508.163 | -1.468.548 |
| Kvinnulandslið | -801.953 | -1.522.449 |
| Ungdómas manslandslið | -306.983 | -515.119 |
| Ungdóms kvinnulandslið | -176.545 | -525.647 |
| Skeið, venjingarskeið og dómaraskeið | -221.207 | -174.095 |
| | **-2.476.272** | **-4.697.810** |

## NOTUR

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| **Nota 5. Felagskostnaðir** | | |
| Limagjøld | -8.948 | -41.641 |
| Tryggingar | -22.709 | -14.895 |
| Ferðakostnaðir og umboðan | -23.002 | -7.916 |
| Altjóða fundarútreiðslur | -16.589 | -146.637 |
| Fundarútreiðslur | -21.003 | -6.985 |
| Gávur o.a. | -5.637 | 0 |
| Aðrir felagskostnaðir | -49.663 | -47.861 |
| | **-147.551** | **-265.935** |
| **Nota 6. Fyrisitingarkostnaðir** | | |
| Tryggingarendurgjald | 25.700 | 0 |
| Tól, teldur, heimasíða og lýsingar | -23.589 | -99.504 |
| Skrivstovuhald, postgjøld og bókhald | -63.777 | -28.072 |
| Telefon og internet | -24.887 | -25.766 |
| Roknskaparhjálp og grannskoðan | -22.975 | -18.750 |
| Aðrar fyrisitingarligar útreiðslur | -22.866 | -59.660 |
| Rentu- og bankakostnaðir | -5.781 | -10.094 |
| | **-138.175** | **-241.845** |
| **Nota 7. Starvsfólkakostnaðir** | | |
| Lønir og eftirlønir ítróttarsamsýning | -489.189 | -214.229 |
| Lønir og eftirlønir vanligar | -841.726 | -548.150 |
| Skyldug løn | -200.474 | 0 |
| Lønargjøld | -86.918 | -22.854 |
| | **-1.618.306** | **-785.233** |
| **Nota 8. Avskrivingar** | | |
| Avskrivingar kappingargólv | -24.482 | 0 |
| | **-24.482** | **0** |

**Nota 9. Veðsetingar og eventualskyldur**
Sersambandið hevur ongar veðsetingar við roknskaparlok, men hevur afturgjaldsskyldur mótvegis ÍSF.